## DAGSINS MEINING

# Gransking, menning og nýskapan

Vit hava sett granskingina í fokus á Tinghelluni í Vikuskiftissosialinum hesuferð. Tað er, sum ein høvundunum skrivar "semja í altjóðasamfelagnum um, at skal vælferðin mennast í einum landi, so er neyðugt at brúkt vera umleið 3% av BTÚ í grundgransking, endamálsgransking og til menningarætlanir."

Ein annar høvundur vísir á, at vit ikki hava nøktandi gransking í Føroyum samanborið við grannalond okkara. Í uppgerð frá OECD fyri 2002 sæst, at Svøríki brúkar 4%, Finland 3,5% og Danmark 2,5% av BTÚ til gransking . Um vit leysliga siga, at føroyska BTÚ er 10 mia., skuldu Føroyar brúkt 400 mio. til gransking fyri at brúka lutfallsliga líka nógv til gransking sum Svøríki. Upplýst verður samstundis, at vit nýta undir 1% av BTÙ til gransking. Í hesum sambandi verður tó mint á, at vit hóast hesi lágu tøl, veruliga hava gransking á høgum støði, við tað at vit eiga úrmælingar, sum eisini vekja altjóða ans við teirra gransking. Hetta er gott, og her er nakað at byggja víðari á.

Tað er eisini áhugavert, at tað hóast alt verður rikin ein almennur granskingarpolitikkur, og at tann peningur, sum er tøkur til gransking, menning og nýskapan, kemur frá tí almenna. Veikleikin er, at játtanin er alt ov lítil, og at privata vinnulívið als einki letur hesi trý økini. Tað má tí ásannast, at skulu Føroyar fáa gagn av granskingarlokomotivinum, so mugu vit upp á tey 3 prosentini av BTÚ til økini gransking, menning og nýskapan. Her mugu bæði tað almenna og tað privata broyta kós og viðurkenna týdningin av gransking, menning og nýskapan.

Ein av greinskrivarunum er sera atfinningarsamur mótvegis vinnuliga bygnaðinum í Føroyum, sum hann samanber við tann norðurkoreanska. Tað er tíverri nakað um hetta. Men hví ikki venda tí við og siga, at tá tað almenna nú eigur dastið av "tí privata" vinnulívinum, hví so ikki nýta hetta til at leiða ein part av vinningsbýtinum til gransking? Hví eru t.d. allar milliónirnar, sum landið hevur fingið sum vinningsbýti úr Føroya Banka bert farnar í landskassan? Hví hevur eingin hugsað um at leiða ein part av hesum peningi yvir í økið, sum fevnir um gransking, menning og nýskapan?

Vit hava óteljandi dømi um lond, ið hava ment seg úr kreppum við at satsa sterkt uppá gransking. Latum okkum læra av hesum londum t.d. av Finlandi og fara til verka her og nú. Landsstýrissamgongan hevur í samgonguskjalinum boðað frá, at ein vil samskipa alla føroyska gransking. Granskingarráðið hevur kunngjørt sínar visiónir. Hetta er alt bæði skilagott og áhugavert. Men hetta krevur ein greiðan og miðvísan granskingarpolitikk við greiðum málum fyri økið gransking, menning og nýskipan, grundleggjandi bygnaðarbroytingar og nógv størri játtanir. Spurningurin er tí: nær síggja vit nøkur ítøkilig úrslit av hesum máli, sum er sett út í kortið við samgonguskjalinum. Í Tinghellunikronikkini í dag er eisini áhugavert at hoyra, hvat formaðurin í Granskingarráðnum sigur og heldur um støðuna á økinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Góða mamma tað var ikki eg!

**Annita á Fríðriksmørk,**
*tingkvinna Tjóðveldisfloksins*



Í stuttum sigur Jógvan við Keldu í svari til undirritaða í Sosialinum og í Dimmu ávíkavist 21. og 22. september 2004, at:

- tað er ikki Jógvan við Keldu, men danska fólkatingið, sum er upprunin til óskili, sum fer fram við útvísingunum av útlendingum úr Føroyum fyri tíðina,
- tað er ikki Jógvan við Keldu, men Høgni Hoydal sum hevur sett galdandi mannagongd í verk,
- tað er ikki Jógvan við Keldu, sum ger nakað galið, men fjølmiðlarnir, sum viðgera málini ábyrgdarleyst og óvirðiligt.

Soleiðis megnar landsstýrismaðurin á trimum frontum í einum og sama lesarabrævi, at frásiga sær alla ábyrgd av tí, sum fer fram á útlendingaøkinum.

### Innlendismálaráðið tilmælir

Men er tað ikki innlendismálaráðið, sum í hvørjum einstøkum føri ger tilmæli til danska útlendingastýrið, sum síðani tekur avgerð.

Og hevur danska útlendingastýrið noktað at fylgt tilmælinum frá innlendismálaráðnum?

Og um tað ikki er politikkurin hjá Jógvani við Keldu, sum er orsøkin til hesar útvísingarnar, hví var hann so settur undir umsiting av sínum egnu samgongufeløgum her fyri?

### Danska Fólkatingið og Tjóðveldisflokkurin skylduna

JvK gevur donsku lóggávuni skylduna fyri tað, sum nú fer fram í Føroyum. Við hesum fær hann tað at ljóða, sum um, at tað eru tær herdu broytingarnar, sum komu í gildi í Danmark eftir at Bertel Haarder tók við sum ráðharri, sum nú eisini eru galdandi fyri Føroyar.

Men so er ikki.

Hesar herdu broytingar eru ikki galdandi í Føroyum. Tað er framvegis tann gamla danska lóggávan, sum er galdandi her, - við ávísum tillagingum og undantøkum fyri serlig føroysk viðurskifti.

Og fyri alt tað, so hevur danska samfelagið heilt aðrar trupulleikar at dragast við á útlendingaøkinum – bæði viðvíkjandi integratión, flóttafólkum, innflytarum og familjusamanføringum. Trupulleikar, sum á ongan hátt kunnu samanberast við føroysk viðurskifti. Og tí nýtist ongum herheima at spæla Bertel Haarder.

### Avtalan var komin undir land

Og so sigur Jógvan við Keldu seg sláa fast, at: "Undanfarna landdstýri, sum Tjóðveldisflokkurin var partur av, var samt við donsku myndugleikarnar, at sivenjan sum var í Føroyum fram til á heysti í 2003, var farin av lagi, og at vit máttu koma aftur á beint." Men hví verður onki í svarinum sagt um, at HH longu hevði fingið ta avtaluna á beint, og at semja varð gjørd við Bertel Haarder um, hvussu farast skuldi fram.

Avgjørt var jú, at avtalan skuldi undirskrivast 5. desember av Høgna Hoydal og Bertel Haarder, men bleiv av ongum tí landsstýrismanning Tjóðveldisfloksins fekk uttan ávaring fótin dagin fyri avtala_a undirskrivingardagin. Vit fingu nemliga fótin hin 4. desember.

Men tá ið ein landsstýrismaður byggir á herðarnar á undanfarna, átti hann eisini at kunna undirskrivað eina so góða og greiða avtalu sum hana sum var komin undir land, og sum er almenn.

### Men tað ger Jógvan við Keldu ikki!

Vandin er jú, at so fer Høgni Hoydal, sum gjørdi alt arbeiðið, avstað við æruni!

Ístaðin fyri hevur hann valt at vavt alt upp í ein ellibita, so ongin eftirhondini veit, hvat er galdandi á útlendingaøkinum.

### Ruddast mátti upp í ólógligum uppihaldum:

Høvuðsarbeiðið, hjá undanfarnu samgongu, við at fáa skil á útlendingaøkið í Føroyum gekk annars út uppá at samla alt tað, sum hevði við arbeiðs- og uppihaldsloyvi og við familjusamanføringar at gera, undir løgmálaráðið við m.ø. tí endamálið at fáa alt økið, sum tað er samlað og yvirtikið á føroyskar hendur. Men hetta steðgaði upp, tá ið Tjóðveldisflokkin varð koyrdur úr samgonguni. Síðani veit ongin, hvat vendir niður og hvat vendir upp, landsstýrismaðurin frásigur sær alla ábyrgd og yvirtøkuætlanin er steðgað.

Tann siðvenjan, sum sipað verður til, sum var farin av lagi, og sum fór fram til á heysti 2003, hevur onki at gera við tað, sum hesi málini snúgva seg um. Kortini vísir JvK í hesum sambandi m.a. á, at ávaring var komin frá fútanum um, at hann var við at missa tamarhaldið á støðuni, um verandi gongd helt fram. Men tað sum onki verður sagt um, er, at tað sum var farið út av lagi, og sum arbeitt var við at fáa á beint, var illgrunin um ólóglig uppihald, sum vóru ymsastaðni í landinum.

Uppihald, hvørs útlendingar eftir føroyskum forholdum fingu ómenniskjansliga viðferð.

At Jógvan við Keldu velur at draga hetta inn í verju sína av útinnandi arbeiðinum av arbeiðs- og uppihaldsloyvum, vísir hvussu trupult tað er at legitimera tað, sum í veruleikanum fer fram í løtuni.

Men annars vil eg siga túsund takk fyri svarið, sum sigur nokkso nógv um støðuna!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Superstjóri í ÚF og SvF

**Petur Jacobsen,**
*stjóri á Rás 2*



Samanlegging sæð við Rás 2'sa eygum

Eg havi hugt eitt sindur eftir, hvussu ÚF hevur tikið ímóti Rás 2 síðani hon byrjaði í des. 99.

Tann fyrsta úttalan í pressuni frá útvarpsstjóranum var, at hann ætlaði at fylgja væl við, so Rásin kom at gjalda tað sama í avgjøldum sum ÚF - tann fyrsta hóttanin. Hetta hevur ein almennur stjóri onki við at gera, hann átti heldur at ynskt okkum vælkomnum.

Eitt smápartafelag hjá einum av fyrstu eigarunum av Rás 2 var í 2000 við til at skipa fyri eini konsert við Dubliners í Føroyum. Tá varð frá leiðsluni í ÚF sent mail til starvsfólkini um ikki at siga nakað um hesa konsert. Grundin var, at tað ikki skuldi reklamerast fyri einum, sum arbeiddi hjá »kappingar-neytanum« - onnur beistagerðin. Vit eru ikki og skulu heldur ikki vera kappingarneytar, vit eiga at samarbeiða til gagns fyri alt Føroya fólk.

Í 2002 vendi Birgar Johannesen sær til okkara um saman við Djóna at hava eina leygarkvøldsending við gomlum poppi. Vit játtaðu og fingu eftir mínum tykki eina góða sending í lag, sum vit eisini høvdu stuðlar til, so Birgar og Djóni kundu fáa eina samsýning. Hetta gekk væl í nakrar mánaðir, men so knappliga ein dagin kom mail frá Birgari um, at hann noyddist at gevast við sendingini eftir boðum frá leiðsluni í ÚF, tí teir vildu ikki, at hann arbeiddi fyri Rás 2. - triðja beistagerðin.

Birgar arbeiðir hjá Smyril Line og var bert freelance á Rás 2. Stutt eftir var sendingin í ÚF, men undir øðrum navni.

Ein dagin í 2003 ringir ein, sum hevur sendingar á Rás 2, til ÚF og biður um eina kunngerð fyri Rás 2. Áðrenn hesin fær møguleika at siga innihaldið í kunngerðini, sigur daman í ÚF skrøpp: »Vit lýsa ikki fyri Rás 2«. Persónurin frá Rás 2 forklárar, at tað bert skal kunngerast hvønn tosað verður við í sendingini hjá sær, og at rokningin skuldi sendast til sín. »Bíða við«, tað gekk ein løta, so kemur daman aftur til hornið og spyr um tekstin, tað gekk við neyð og deyð.

Til Summarfestivalin 2004 í Klaksvík var ætlanin, at Rás 2 skuldi senda beinleiðis. Tað var ein partur av eini lýsingaravtalu, sum vit høvdu við fyriskipararnar (les Pegasus). Stutt fyri at festivalurin skuldi byrja, fingu vit at vita, at Jógvan Jespersen ikki vildi, at Rás 2 skuldi fáa ljóðsignal frá pallinum, tað skuldu bara teir hava. Ein so ljót gerð sum hetta kann bert ein beistaktigur persónur finna uppá - fjórða beistagerðin.

Studio Pegasus er í so stórari skuld, at tað sindrið, sum fæst frá ÚF í samsýning fyri sendingarnar, tey gera, er meir enn nóg mikið til, at ÚF totalt stýrir Pegasus (og Summarfestivalinum).

Tá nýggi bygningurin hjá Kelduni í Skálabotni var tikin í brúk herfyri, var øll pressan boðin við, og vóru umboð fyri flestu teirra eisini til tíðindafundin, tó ikki ÚF. Grundgevingin var, at hatta hevði ikki nóg nógv uppá seg til teirra tíðindasending, men ger tann samkyndi felagskapurin við nøkrum og tíggju limum eitt ella annað, hevur tað tíðindavirði. Ella kanska at Rás 2 skuldi senda beinleiðis frá tiltakinum hevur fornermað ÚF, og so straffa teir Kelduna afturfyri, nei ikki veit eg.

At leiðarar á stovnum fremja maktmisbrúk hevði fingið fylgjur alla aðrastaðni, men helst ikki í Føroyum.

Eg kundi komi við fleiri dømum, men hesi eru lættast at prógva.

Norðurlandahúsið, ja, har situr kona Jógvan Jespersen sum leiðari. Hóast fleiri áheitanir um eina lýsingaravtalu er einki at heinta hjá Rás 2. Vit fáa ikki so frægt sum eitt svar, hóast tað hevði verið ein sjálvfylgja, tá vit í tónleikinum bera ein so stóran part av tilfarinum víðari, sum eitt norðurlendskt mentanarhús stendur fyri. Hevur Jógvan Jespersen nakað við hetta at gera? Vit kunnu bert gita.

Vit kunnu t.d. taka Smyril Line, sum helst brúkar fleiri hundrað túsund um ikki milliónir til handilslýsingar í ÚF og SvF. Fara hesir miðlar at koma við kritiskum, borandi atfinningum um hesa fyritøku og kanska vænta, at lýsingainntøkurnar verða stoppaðar? Nei vell?

Eg haldi, tað var áðrenn síðsta løgtingsval at tosa varð alment um, hvør vítt almennu miðlarnir skuldu senda handilslýsingar ella ikki. Tá var Óli Hammer, stjóri á Smyril Line, frammi í almennu miðlunum og segði, at alt skuldi vera sum tað var. Undrar tað nakran?

ÚF & SvF eru helst einastu almennu miðlar í heiminum, sum eru 100 prosent handilsligir, samstundis sum teir við lóg kunnu krevja eitt risagjald frá hvørjum húsarhaldi í landinum. Tað kundi verið vert at fingið kanna, um hetta er heilt lógligt, men kappingaravlagandi, tað er tað so heilt víst.

Mær vitandi koyra bæði tey stóru bløðini - Dimmalætting og Sosialurin - við stórum undirskoti. Almennu miðlarnir fara við lýsingainntøkunum. Fylgjurnar verða helst, at bløðini, fyri ikki at gevast, fáa almennan útberingarstuðul ella detta burtur saman við Rás 2, og so er aftur monopol, sum ein maður stýrir.

At avtaka loftmiðlamonopolið og samtíðis gera karmarnar so ringar at virka undir er at líkna við, at rækjuflotin fær loyvi til stórhvalaveiðu á Toftavatni.

So í framtíðini verða tað kanska Jógvan Jespersen fyri almenna miðlagigantin, og Oggjatíðindi við Dan Klein fyri fríu pressuna, sum mær vitandi er einasti miðil, sum ikki er serliga bundin av lýsingainntøkum ella felagskapum og kann skriva tað, hann vil.

ÚF hevur í fleiri ár havt millum 10 og 15 milliónir á bankabók. Tað er umleið 30 prosent av umsetninginum. Hetta eru ov nógv kravdur peningur frá Føroya fólki. Sammett við sjúkrahúsverkið, skuldi tað samla sær einar 300 milliónir at staði ímóti við til møguligar ringar tíðir, og allir aðrir almennir stovnar eisini.

Hyggja vit at sendingunum hjá ÚF, er lítil nýhugsan, mest kopi. Barometrið er einki annað enn kopi av Dream Team hjá Atlantic Radio í sínari tíð við Tróndi Vatnhamar og Jens Tummas Ness, sanniliga við pørtum av somu manning eisini. Hesar sendingar vóru hildnar at hava ringan moral og lágt mentanarvirði, og innihaldi, tað er so ikki broytt nakað, tá ein g-strongur skal vera temaðið í eitt heilt summar og fáa so stóra umtalu í almenna miðlinum, men ongin talar at. Helst er onki sum fær okkum at kløkkast av, hvat ÚF kann finna uppá, og so tá SvF í Degi og viku endaði sendingina, var alt fullkomið. Vit fingu høvi at síggja hesar góðu menn standa mitt í Havn í G-strongi og einum stórum fansi stingandi framúr. Hatta var júst tað, sum tey smáu høvdu brúk fyri at síggja frá mentanarberunum hjá tí almenna, og so í einari tíðindasending í prime time. Ja, hetta kemur helst undir Public Service!

Ynskiløtan hjá Rás 2 er kopierað til fyrrapartar hjá ÚF. Nær kundi tú ókeypis fáa nakað ynski uppfylt frá ÚF fyrr? Og so fáa tey at lesa eina tóma heilsan Ja, tað er bert at takka Rás 2 fyri.

ÚF er blivið meiri populistiskt enn Atlantic Radio nakrantíð var, fáar mentanarsendingar - tær flestu úr Pegasus, nógvur tónleikur og nógvar tómar skemtisendingar. Tað er eingin meining í, at ÚF leggur seg meir og meir eftir at líkjast Rás 2. Vit skulu hava eitt seriøst alment útvarp, sum vit eru tvingað at gjalda nógvar pengar fyri, og so kunnu hinar rásinar vera meiri lættisoppakendar, alt eftir sum pengar eru til.

So leingi sum teir almennu miðlarnir eru bundnir av lýsingainntøkum, fáa vit ikki eina objektiva tíðindatænastu, og at ÚF og SvF fáa somu leiðslu, ger støðuna heilt farliga fyri tíðindaflutningin, tak til dømis tað, sum Óli Jacobsen skrivar um, at mál, sum ikki hóva leiðsluni, verða útifryst frá miðlunum. Hetta er heilt ræðandi og fer bara at versna.

At vit fáa Jógvan Jespersen til superstjóra er ein vanlukka fyri føroyska pressu og alt Føroya fólk. Hann er langt frá uppgávuna vaksin. At verða róstur upp til skýggja fyri gott útvarp tá tú hevur einar 30-40 milliónir at brúka um árið, skilji eg ikki. Hvat nýtt er komið fram í ÚF, síðan Jógvan Jespersen tók við? EG kann ikki koma í tankar um nakað.

Vit senda umleið sama tímatal um vikuna fyri gott 2 milliónir, munurin á tónleikatímum er heldur ikki so stórur, ÚF umleið 50-60 prosent og Rás 2 umleið 70-80 prosent.

Uppundir næstseinasta løgtingsval var Jógvan á Lakjuni av ÚF skírdur fyri at gera lobbyarbeiði fyri Rás 2, tá uppskot var um, at Rásin skuldi fáa part av útvarpsgjaldinum, men við tí, sum landstýrismaðurin nú er í ferð við at gera, er alt tað øvuta við at henda. Hann avhøvdar alla ta óalmennu pressuna, tað verður sum í teimum mest tilafturskomnu londunum, vinna og handilslívið hevur eina alt ov stóra ávirkan á hvat, ið sigast skal ella ikki, av teimum almennu miðlunum.

Um landstýrismaðurin í mentamálum Jógvan á Lakjuni ikki skal koma í søguna sum tann ringasti fíggindin hjá fríari pressu í landinum, skyldar hann Føroya fólki, at starvið verður boðið út, so væl kvalifiseraðir umsøkjarar eisini hava møguleikan at søkja. Eg helt, at tað var eitt krav, at tíðandi størv hjá tí almenna skuldu bjóðast út.

Eg eri ikki kvalifiseraður og søki ikki starvi.

Tað kann tykjast sum eg leggi eftir Jógvan Jespersen sum privatpersóni, men so er ikki, bert sum almennur miðlastjóri. Hann er helst av fittastu monnum, tó ger tað hann ikki egnaðan til superstjóra eftir mínari áskoðan.

Alt, sum her er skrivað, er mín egna ábyrgd, eg havi ongan tosað við ella spurt um loyvi at skriva tað, sum eg havi skriva.

# Viðmerking til kronikkina "Other Peoples Money"

**Annika W. Joensen**
*forkvinna í Javnstøðunevndini*



Javnstøðulógin ásetur, at eitt javnt kynjabýti skal verða í almennum nevndum, ráðum v.m. sum fyrisitingarvaldið útnevnir. Kynið verður tó ikki tikið framum førleikan í almennum nevndum, ráðum v.m. og nevndir hjá almennum partafeløgum eru ikki umfataðar av §8 í javnstøðulógini.

Í kronikkini "Other Peoples Money", 21. september 2004 í Sosialinum og Dimmalætting, viðgerð Óli Samró m.a. føroyskar nevndir og umrøður § 8 í javnstøðulógini.

Seinast í brotinum við yvirskriftini 'Lønmóttakaramentan' stendur fylgjandi: (citat byrjað) "Heilt galið blívur tað, tá almennar nevndir verða útvaldar eftir, at tað skulu vera eins nógv av hvørjum kyni! Hetta er beinleiðis ræðuligt! Vit hava so fáar skikkaðar kandidatar til at taka á seg at vera professionellir nevndarlimir. Javnstøðulógin er her ein háðan móti kvinnu og manni" (citat liðugt).

Fyri lesaran kann tað sýnast sum, at kynið verður tikið framum førleikan í almennum nevndum, ráðum v.m. og at javnstøðulógin heimilar hesum, og at nevndir hjá almennum partafeløgum eru umfataðar av §8 í javnstøðulógini. So er ikki.

**Dømi:** Ein nevnd við fimm limum skal setast. Seks fólk eru funnin, sum hava førleikan. Fýra kvinnur og tveir menn. Tríggjar kvinnur og ein maður verða vald. Ein maður og ein kvinna eru nú eftir, sum hava sama førleika. Landsstýrisfólkið velur mannin frammum kvinnuna við tilvísing til §8 í javnstøðulógini, og fær javnasta møguliga kynjabýtið.

Um ein maður og ein kvinna í uppskoti hava sama førleika, kann landsstýrismaðurin also t.d. velja mannin, fyri at fáa eitt javnt kynjabýti. Ein persónur, sum ikki hevur kravda førleikan, kann ikki við tilvísing til javnstøðulógina veljast í eina nevnd.

Um tað ikki er møguligt at fáa eitt javnt kynjabýti í einari nevnd, kann søkjast um undantaksloyvi frá Javnstøðunevndini.

### Javnstøðulógin ásetur:

§8. Allar almennar nevndir, ráð, umboð og líknandi, sum fyrisitingarvaldið útnevnir, skulu vera sett saman soleðis, at umleið eins nógvir limir av báðum kynum eru umboðaðir. Sama er galdandi fyri tær nevndir, ráð umboð og líknandi, sum løgtingið og bý- og bygdaráðini útnevna, tá ið tey, ið útnevnast skulu, ikki nýtast at vera løgtings- ella bý/bygdaráðslimir.

**Stk. 2.** Tá ið serligar grundir eru fyri tí, kann javnstøðunevndin geva undantaksloyvi í hvørjum einstøkum føri ella fyri eina yrkisgrein sær.